# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Olivia Hansen 85 ár

Í dag, hósdagin 9. juni, verður Olivia Hansen í Saltangará 85 ár. Liva er ættað úr Saltangará, og har hevur hon búð mest sum alla sína tíð.

Foreldrini hjá Livu vóru Tina, sum var ættað úr Havnini, og Sámal, sum var ættaður av Vollanum á Glyvrum. Tey fingu tíggju børn - seks gentur og fýra dreingir - og Liva var næstyngst. Tina doyði í 1956, og Sámal doyði í 1960.

Sum ung genta tænti Liva á Toftum. Fyrst var hon hjá Sannu og Andreasi í Túni, og seinni var hon hjá Jonu og Akseli Skaale. Í báðum húsunum var tað, sum so nógva aðra staðni, kúgv og seyður, so umframt tað, sum nú á døgum verður roknað at hoyra til húsarhaldið, hevði Liva eisini við hoygging, mjólking og alt annað í tí sambandinum at gera.



Aksel Skaale hevði postútberingina á Toftum. Tað bar við sær, at posturin skuldi berast út á Toftum, Saltnesi, Nesi og eisini í Æðuvík. Aksel arbeiddi sum timburmaður. Tí lá tað ikki altíð fyri hjá honum at ganga við posti, og so hjálptu hini í húsinum til. Eisini Liva plagdi at ganga við posti, og tað vildi eisini siga, at hon einsamøll fór gjøgnum hagan og til Æðuvíkar.

Liva giftist við Jústinus Hansen, sum er ættaður úr Túni á Toftum. Foreldrini hjá honum vóru Sigga, sum var ættað úr Svínoy, og Hanus ella Hanneba í Túni. Tey doyðu ávikavíst í 1935 og 1937.

Tá ið Liva og Jústinus settu búgv, vóru húsini púra einsamøll ovarlaga í Heiðunum. Nú er nógv bygt rundanum hjá teimum, og húsini eru mest sum mitt í býnum.

Liva hevur avgjørt hoyrt til tey friðarligu í landinum. Hon og Jústinus fingu tvey børn - Signhild og Svend - og sum tær flestu mammurnar og konurnar tá í tíðini, so var hon heima hjá børnunum, meðan Jústinus arbeiddi hjá D. P. Højgaard.

Tá ið børnini vóru undankomin, vaskaði Liva í fleiri ár á posthúsinum í Saltangará. Henni hevur altíð dámað væl at vitja tiltøk, sum hava verið í Saltangará, og hon er framvegis løtt upp á sporið.

Signhild giftist til Fuglafirðar við Kára Zachariassen. Tey eiga trý børn. Fyri Livu og Jústinus og alla familjuna kendist tað ógvuliga sárt, tá ið Signhild gjørdist sjúk og bara 55 ára gomul andaðist í 1999.

Svend giftist við Annu Joensen, sum er ættað úr Gøtu. Tey búgva í Saltangará, og tey eiga seks børn. Føðingardagin er Liva hjá ommudóttrini í Gøtu.

Sosialurin
www.sosialurin.fo

### 80 ár

Í dag, 9. juni fyllir Hans Johansen, Argir, 80 ár. Dagurin verður hildin saman við børnunum.

### Dagurin

**9. juni. Primus**, deyður umleið ár 300. Hann var rómverji. Hann og bróðir hansara, Felicianus vórðu illa píndir og tiknir av døgum. Primus merkir *tann fyrsti*.

## Yvirlækni Arge 80 ár

10.juni verður Elieser Arge, vanliga nevndur Essa 80 ár.

Essa er Havnardrongur, sonur Sigrid Paulinu Johonnu Petrinu Sofíu f. Simonsen úr Jørundsstovu í Norðragøtu og Niels Martin Andreas Arge, róptur Diss, úr Klokkarastovu í Tórshavn.

Essa tók í 1943 studentsprógv á "lagtingets studenterkursus", ið tá húsaðist í Realskúlanum.

Síðani arbeiddi hann í ’43 - ’44 sum voluntørur á laboratoriinum á Dr. Alexandrines hospitali. Tá tað framvegis ikki bar til at sleppa avstað í lestraørindum, fór Essa 1 1/2 ár við Norðbúgvanum hjá Hans Paula Johannesen, sála, har hann vann sær pening fyri fyri lestrakostnaðin.

Í 1945 bar aftur til at fara til Danmarkar í lestrarørindum og Essa fór tískil til Keypmannahavnar á



heysti 1945 og tók har á lærda háskúlanum prógv sum lækni í 1952.

Í 1950 giftist Essa við Lydiu, dóttir Hans Hendrik Hansen, av Eiði, sum í mong ár sigldi sum skipari fyri DFDS, og Elsebeth Frederikku, f. Poulsen við Neyst í Hvalba. Saman hava Essa og Lydia døturnar Hannu, f. 1951, búsitandi í Ísrael og Sigrid, f. 1954, ið býr í Havn.

Aftaná loknan lestur og kravda turnusskipanin var av, fór Essa undir specialisering í kirurgi og anæstesiologi. Hann hevur starvast á Kommunuhospitalinum, Blegdammen og á Ríkissjúkrahúsinum. Eitt skiftið í 1960 til 1962 fór leiðin aftur heim á Dr. Alexandrines hospital, at starvast saman við tí legendariska yvirlækna Dahl. Eitt ár uttan fyri høvuðsstaðirnar, nevniliga á Thisted Amtsygehus, bleiv tað eisini til, áðrenn Essa í feb. 1965 bleiv yvirlækni á skurðdeildini á Dr. Alexandrines hospital.

Mong eru tey, ið gjøgnum árini hava notið gott av góða handalagnum hjá Essa, til hann á várið í 1994 fór frá við eftirløn.

Essa hevur eisini verið virkin á nógvum øðrum økjum. Hann var býráðslimur í Tórshavnar býráð 3 setur frá 1974, samstundis sum hann var løgtingslimur fyri Fólkaflokkin.

Íðin golf- og badmintonspælari og harumaður í nógv ár, men er tó nú givin við hesum.

Føðingardagurin verður hildin í summarhúsinum "Puk" í Gilleleje, ið Essa og Lydia hava havt gleði av síðani 1959.

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at
kæra kona, móðir, vermóðir og omma okkara

**Henrietta Frederikka Skeel Kirke**

(Jetta), fødd Vang
Kaldbak

andaðist á Landssjúkrahúsinum
mánadagin 6. juni, 62 ára gomul.

Farið verður úr Landssjúkrahúskapellinum
hósdagin kl. 16.

Jarðarferðin verður úr Nazaret í Kaldbak
fríggjadagin kl. 14.

*Vegna tey avvarðandi*
**Álvur**

## Hjartafelagið havt aðalfund

Hjartafelagið er eitt áhugafelag, sum m.a. hevur til endamáls at upplýsa og leiðbeina um hjartasjúkur, og at eggja til fyribyrgingar av teimum við at stuðla og seta í verk heilsufremjandi uppalingarvirksemi.

At stuðla vísindaligari gransking av sjúkum í hjarta og blóðrensli, atvoldum teirra, fyribyrging og viðgerð.

Nevndin í Hjartafelagnum er nú henda:

Sólvá Dam, formaður; Leivur Johannesen, næstformaður; Marita A. Magnussen, kassameistari; Ása Poulsen, skrivari; Heðin Thomsen, nevndarlimur, og Esmi Olsen, tiltakslimur og Holger Hansen, tiltakslimur.

Hjartafelagið hevur seinastu 17 árini havt tiltøk ymsa staðni í Føroyum, har hildið hava verið fyrilestrar og fólk hava havt høvi at blíva kannað, m.a. blóðtrýst, blóðsukur og kolesterol. Hesi árini eru fleiri enn 5000 fólk kannað.

Næsta mál hjá Hjartafelagnum, er at fáa eina heimasíðu við m.a. ymiskum upplýsandi tilfari.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum,
at okkara góða systir, svigarinna, fastir,
abbasystir og langabbasystir

**Anna Elisabeth Jacobsen**

Tórshavn

andaðist mánadagin 6. juni, 81 ára gomul.

Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum
hósdagin kl. 14.00.

Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni
fríggjadagin kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*
**Herluf og Mina**